

# TÁ NÝGGJA ÆTTARLIÐIÐ **TÓK VALDIÐ Í AMERIKA**

TANN 20. JANUAR Í **1961** VARÐ **JOHN F. KENNEDY** SUM TANN YNGSTI **FORSETIN NAKRANTÍÐ** SVORIN Í EIÐ Í **USA**. HÓSDAGIN VÓRU LIÐIN **50** ÁR, SÍÐAN **HETTA** HENDI, OG **FRAMVEGIS** VERÐUR **KENNEDY** HÁMETTUR KRING **HEIMIN**, IKKI BARA TÍ HANN **DOYÐI** BLÓÐUGA ALT OV **UNGUR**, MEN EISINI TÍ **HANN** VAR EIN FRAMÚR GÓÐUR **RØÐARI**, STRÍDDIST HART FYRI **JAVNRÆTTINDUM** Í USA OG **FYRIBYRGDI**, AT **KUBA-KREPPAN** ENDAÐI VIÐ EINUM **HEIMSKRÍGGI**



**POLITISK SØGA**

Uni Arge
ua@sosialurin.fo

Undir valstríðnum upp undir amerikanska forsetavalið í 2008 vísti Barack Obama ferð eftir ferð á, at USA hevði tørv á broytingum. »Yes we can,« var hansara mest brúkta slagorð, og nógv upplivdu mannin sum ein frelsandi eingil fyri stórveldið, ið republikanararnir við George Bush á odda høvdu havt ræðið á síðan 2001. Fólk vóru troytt av krígsretorikki og sviki í fíggjarkervinum og høvdu tørv á, at heilt nýggj stjórn slapp framat. Nýggja lotið æt Barack Obama. Skjótt fekk hann støðu sum ein filmsstjørna og vann eisini forsetavalið lættliga á krígsveteraninum, John McCain.

Støðan undir valstríðnum í 1960 var ikki heilt ólík støðuni í 2008. Dwight D. Eisenhower, ið var virdur krígsveteranur, hevði verið forseti síðan 1953, men demokratarnir vildu nú hava republikanararnar úr Hvítu Húsunum. John F. Kennedy æt maðurin, sum skuldi dystast við varaforsetan hjá Eisenhower, Richard Nixon, um valdið í Washington. Kennedy kunngjørdi, at USA stóð á einum vegamóti og mátti setast í gongd aftur eftir drúgva stillstøðu undir Eisenhower. Bara eitt nýtt ættarlið kundi tryggja, at hetta hendi.

John F. Kennedy vann forsetavalið sera tepurt á Richard Nixon. Ikki minst hansara fólkatekki tryggjaði honum sigurin. Í fyrstu sjónvarpaðu valdystunum í amerikanskari søgu var hann sum ein filmsstjørna á at líta, ungur, framfýsin og sjarmerandi. Nixon tóktist harafturímóti at vera illa til passar av øllum hóvastákinum, og so sá hann eisini illbrýntur út, tí lampurnar lýstu heldur óheppið á hann. Eftir dystirnar í sjónvarpinum vístu veljarakanningar, at sendingarnar øktu um undirtøkuna fyri Kennedy. At enda vann hann so akkurát valið.

Harry S. Truman, ið var forsetin, sum í 1945 gjørdi av, at kjarnorkubumbur skuldu tveitast yvir Japan, hevði í fyrstani onki álit á Kennedy. Hann helt, at Kennedy-familjan einans vildi hava vald og legði líka í, hvat valdið varð brúkt til. Heldur ikki dámdi honum pápa John F. Kennedy, Joseph, ið hevði verið undir illgruna at smugla brennivín undir forboðstíðini og framt ivasamar partabrævahandlar í Wall Street. Franklin D. Roosevelt hevði tó í síni forsetatíð útnevnt hann til sendiharra í London, men har gjørdist hann viðhaldsmaður hjá Neville Chamberlain.

John F. Kennedy hevði tó styðjað Winston Churchill, og tá Berlinmúrurin varð bygdur í 1961, var Kennedy ógvuliga avgjørdur í sínum meiningum. Tá broytti Harry S. Truman hugsan um tann unga alvan í forsetasessinum. Helst var meiri stirðil í soninum enn pápanum, helt hann, og tað sama helt Eleanor Roosevelt, kona Franklin D. Roosevelt. Hon fekk ta fatan, at Kennedy visti nógv, men at hann kortini ikki var so sjálvvísur í øllum. Hetta dámdi henni, tí sovorðin maður dugdi at lurta og seta røttu spurningarnar.

## Nýggir vindar

Nýggi forsetin dugdi ikki bara at lurta og seta røttu spurningarnar. Hann var eisini ein framúr góður røðari, og hetta kom ikki minst til sjóndar tann 20. januar í 1961, tá hann varð svorin í eið sum forseti í Washington. Røðan, hann tá helt, fór í søguna sum ein av teimum kendastu nakrantíð. Serliga setningurin »Spyr ikki, hvat land títt kann gera fyri teg, men hvat tú kanst gera fyri land títt« er nógv endurgivin, men hesin setningurin var ikki bara tikin úr leysum lofti. Hann var niðurstøðan av innihaldinum í røðuni, ið m.a. var hetta:

»Latið nú ljóða av hesum stað, mótvegis vinum sum fíggindum, at kyndilin er latin einum nýggjum ættarliði av amerikanarum, sum er føtt í hesi øldini, hart roynt av kríggi, búnað av einum hørðum og beiskum friði, errið av sínum arvi. Latið allar tjóðir vita, um tær vilja okkum væl ella illa, at vit ætla at gjalda ein og hvønn prís, bera eina og hvørja byrði, standa ímóti allari mótgongd, verja allar vinir og treiskast allar fíggindar fyri at tryggja okkara frælsi. So latið okkum byrja av nýggjum.«

Seinni í røðuni bað Kennedy so allar sínar landsmenn lata vera við at spyrja, hvat landið kundi gera fyri teir, men hvat teir kundu gera fyri landið. Ein ylur fór sum vera man ígjøgnum nógvar amerikanarar hendan dagin fyri 50 árum síðan. Einans 43 ára gamal var John F. Kennedy longu í ferð við at skriva seg í søguna sum ein av teimum